# JAVNAÐARFLOKKURIN
## á Fólkatingi



jaf.fo



# Eitt ár á **borgini**



# Full tíð – fyri allar føroyingar

**Undan síðsta fólkatingsvali lovaði Javnaðarflokkurin – sum fyrsti flokkur nakrantíð – at vann hann eitt umboð, skuldi viðkomandi arbeiða fulla tíð á fólkatingi.**

Flokkurin lovaði eisini, at eitt møguligt umboð á fólkatingi ikki skuldi føra partapolitikk, men arbeiða fyri allar føroyingar.

Við hesum lyftum vann flokkurin annan sessin.

Nú er eitt ár farið. Vit hava havt 12 mánaðir til at umseta lyftini til ítøkilig úrslit.

Á skrivstovuni hava starvast, Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður, Joan Ólavsdóttir, ráðgevi, og trý lesandi: Eirikur í Jákupsstovu, Birita í Dali og Elisabeth F. Rasmussen, sum nú er farin í annað starv. Tað er eingin partapolitisk binding í tí at starvast fyri Javnaðarflokkin á fólkatingi.

# HER ER NAKAÐ AV TÍ, SUM ER KOMIÐ BURTURÚR



## Góðar avtalur á fólkatingi

Javnaðarflokkurin er sjálvstøðugur flokkur á fólkatingi, men vit hava bæði formligt og óformligt samstarv við nógv onnur.

Avtala um samstarv við grønlendsku limirnar verður undirskrivað



### Høvuðsavtalan er við danska javnaðarflokkin. Hon tryggjar okkum:

- Formanssessin í Føroyanevndini
- Limaskap í Norðurlandaráðnum
- Rættstundis kunnleika um øll føroysk mál
- Fundir við ráðharrar eftir tørvi
- Atgongd til allar nevndir, har føroysk mál eru á skrá




SAMBÆRT UPPSKOTINUM TIL DANSKA FÍGGJARLÓG Í FJØR, SKULDI SPARAST NÓGV INNAN LØGREGLUNA Í FØROYUM EINS OG AÐRASTAÐNI Í RÍKINUM.



# Sparingar innan løgregluna strikaðar

Eftir samskifti við fólk innan føroysku løgregluna vendu vit okkum til Morten Bødskov, løgmálaráðharra, og greiddu honum frá trongu umstøðunum í Føroyum. Úrslitið varð, at sparingin í Føroyum varð strikað.

# Nøktandi støðutakan í makrelmálinum


EKSTRA BLADET

DET GAR I FISK

Makrellen kan vælte Helle

To grønlændere og en færing truer med at trække støtten til regeringen

Fængslet efter narkofund

10

Vit lovaðu í valstríðnum, at vit ikki fóru at stuðla eini danskari stjórn, sum fylgdi ES-meirilutanum í makrelstríðnum.

Málið setti donsku stjórnina í eina trupla støðu, tí sum formansland skuldi hon umboða henda sama ES-meirilutan.

Men okkara krav var greitt, og eftir nógvar fundir og samskifti endaði tað við, at stjórnin ikki atkvøddi fyri lógini, sum gevur ES rætt at seta tiltøk í verk. Stjórnin er eisini til reiðar at leggja málið fyri WTO ella Europadómstólin, um Føroyar ynskja tað.

# Føroysk stjórnarskipan í samgonguskjalið




Lars Løkke Rasmussen legði seg út í arbeiðið við føroyskari stjórnarskipan. Vit fingu felt í danska samgonguskjalið, at nýggja stjórnin skal virða hetta arbeiði. Vit hava eisini fleiri ferðir í donskum miðlum greitt frá, hví tað er rímiligt, at Føroya støða í ríkinum verður skipað á egnum grundarlag.






# Sosialar veitingar til føroyingar í Danmark

Undanfarna danska stjórn broytti sosialu lóggávuna soleiðis, at føroyingar mistu rættin til fleiri veitingar. Tað rakti ikki minst stakar uppihaldarar. Aksel Johannesen tók málið upp, tá hann var inni sum eykamaður. Sjúrður tingaðist víðari við stjórnina – og frá 1. januar 2013 fáa føroyingar hesi rættindi aftur.

# Tvískattasáttmálar



## Vantandi tvískattasáttmálar er ein stórur trupulleiki fyri serliga nýggju føroysku frálandavinnuna og FAS-skipanina.

Vit hava tí gjørt drúgva frágreiðing um møguleikarnar fyri, at viðkomandi donsku sáttmálarnir verða víðkaður til eisini at fevna um Føroyar. Vit hava samstarvað við bæði føroysku vinnuna, fíggjarmálaráðið og danska skattamálaráðið um at seta hetta á lunnar.

Eftir fund við Jørgen Niclasen 6. september fór stjórnin formliga undir arbeiðið saman við føroyska fíggjarmálaráðnum – men sum parlamentariskt grundarlag hjá stjórnini, stuðla vit so væl vit kunnu.
**Tað er altíð stuttligt at fáa úrslit í politikki – men nógv stuttligast er tað, tá úrslitini byggja á breitt samstarv!**



# Stórt endurgjald til føroyingar í Føroyum

Nógv, sum frá 1998 til 2011 hava búð í Føroyum men fingið danska løn, hava av órøttum rindað 8% í donskum arbeiðsmarknaðargjaldi.

Vit hava fingið skattamálaráðharran at seta í verk eina kanning, sum møguliga kann hava við sær stórt endurgjald.

Uttan mun til úrslitið fáa tey, sum hava rindað gjaldið í 2009 og 2010, fult endurgjald fyri hesi bæði árini.

# ES – hvørjar møguleikar hava Føroyar?

ES fer helst at broyta fiskivinnupolitikk, og Ísland samráðist um limaskap. Hetta kann ávirka okkara støðu, og tí gera vit eina umfatandi lýsing av, hvørjar møguleikar Føroyar hava. Kanningin verður almenn í vár.




# Samstarv um filmsframleiðslu

Føroyskur filmur er farin at spíra – men tørvur er á serkønari vegleiðing og stuðli á fleiri økjum. Tí hava vit, umvegis danska mentamálaráðharran, fingið í lag samstarv millum Dansk Filminstitut og filmverkstovuna Klippfisk í Føroyum, ið kann geva føroyskum filmi eitt skump rætta vegin.

# Við í øllum orðaskiftum

Tað verður fylgt væl við – bæði inni á Christiansborg og uttanfyri – tá tey stóru orðaskiftini eru á Fólkatingi. Vit hava tikið lut hvørja ferð – og hava fingið sera góðar afturmeldingar.





# Upplýsing um Føroyar

Vit hava lagt stóra dent á at upplýsa um Føroyar – bæði í skipanini á Christiansborg, í donskum fjølmiðlum og við fyrilestrum. Í summar var fólkatingsins Føroyanevnd, har Sjúrður er formaður, á sera væleydnaðari vitjan í Føroyum í fimm dagar. Slíkt gevur eina vitan og skapar eitt forstáilsi, sum er alneyðugt grundarlag undir politiskum avgerðum.





# Føroysk framleiðsla og mentan

Fólkatingssessurin er gott høvi at vísa fram føroyska framleiðslu og mentan. Á vælvitjaðum tiltakið á mentanarnáttini í Keypmannahavn høvdu vit føroyskan tónleik, eins og vit sýndu fram føroyska sniðgeving og ferðamál. Vit hava eisini skipað fyri føroyskari ølsmakking á Christiansborg og sýnt fram føroyska framleiðslu í øðrum samanhangi.

# Hjálp til einstaklingar

NÓGVIR FØROYINGAR VENDA SÆR TIL JAVNAÐARFLOKKIN Á FÓLKATINGI, TÍ TEY ERU KOMIN TVØRT FYRI AV YMISKUM ÁVUM. VIT HAVA HJÁLPT OG VEGLEITT NÓGVUM TEIRRA – OG Í ONKRUM FØRI EISINI FINGIÐ STJÓRNINA AT BROYTA AVGERÐIR, SUM RAKTU FØROYSKAR FAMILJUR.

# Onnur mál

Annað, ið vit hava arbeitt við saman við øðrum:

- Rættindini til føroysku kirkjubíbliuna
- At tryggja at skipið Thorshavn ikki fór av landinum
- Rætturin at nýta fosfat í saltfiskaframleiðslu
- Dagføring av føroyakortum
- Skattur av føroyskum Koda-pengum
- At broyta kravið um danskt A á universitetum
- Yvirtøka av loftrúmi

# Skúlaheim

Beint fyri jól fingu nógv føroysk lesandi boð um, at tey, orsakað av broyttum upptøkutreytum, ikki sluppu inn á donsk skúlaheim. Vit boðaðu straks stjórnini frá, at nýggju treytirnar vóru brot á ta siðvenju, sum verið hevur í ríkinum – og hetta bleiv rættað.



jaf.fo

# HETTA FYRSTA ÁRIÐ HEVUR PRÓGVAÐ TAÐ, VIT SØGDU FYRI VALIÐ:




Javnaðarlistin til síðsta fólkatingsval

Leggur tú alla tína tíð og alla tína orku í fólkatingssessin, so kann nógv koma burturúr. Serliga um ítøkilig úrslit og samstarv verða tikin fram um partapolitiskar markeringar.

# ARBEIÐIÐ HELDUR FRAM TEY ÁRINI, SUM ERU EFTIR.